Kappingarráðið

Í/F Advokatfelagið við Strond 4
Yvir við Strond 4
FO-100 Tórshavn

**Tórshavn, 18. februar 2010**

Journal nr.: 10/00074
Viðgjørt: S.R.

**Att.: Jógvan E. Ellefsen, adv.**

# Avgerðarskriv viðv. joint - venture millum Faroe Seafood, Viking Seafood og Faroe Farming

## Samandráttur

Partarnir Faroe Seafood, Viking Seafood og Faroe Farming ætla at fara saman um framleiðslu av liðugvøru úr laksi. Sambært avtaluni millum partarnar koma Viking Seafood og Faroe Farming inn, sum líkastillaðir eigarar av Faroe Seafood Processing, ið síðan skiftir navn til SalmPro.

Faroe Seafood Processing var stovnað í 2003 og hevur verið rikið við halli síðan byrjan. Onki virksemi hevur verið í felagnum síðan 2008. Sambært ársroknskapinum hjá felagnum fyri 2008 er tað serliga rávørugrundarlagið sum hevur manglað.

Avtalan førir við sær, at tvey alifeløg koma inn sum líkastillaðir eigarar. Hetta vil í størri mun tryggja rávørugrundarlagið hjá nýggja felagnum. Mett verður, at sølufelagið hjá Viking Seafood og Faroe Farming, Salmex fer at selja uml. 3.000 tons til SalmPro, meðan 5.000 tons fara framvegis ótilvirkað av landinum. Í dag selur Salmex uml. 8000 tons av landinum ótilvirkað. Sostatt førir stovnanin við sær, at ein virðisøking av 3.000 tonsum, ið fyrr er farin fram aðrastaðni, nú fer fram í Føroyum.

Kappingareftirlitið sær ongan kappingarligan trupulleika í hesi ætlan. Alifeløgini eru tvey av minstu alifeløgunum í Føroyum og Faroe Seafood hevur sítt virksemi innan føroyska fiskivinnu. Sostatt fer ongin stórvegis miðsavning fram í nøkrum søluliðið í alivinnuni. Eftir ætlan verður vøran seld til ES og USA, og sostatt verður føroyski endabrúkarin ikki ávirkaður av hesum.

Kappingareftirlitið metir, at tað er í tráð við § 1 í kappingarlógini at loyva feløgunum at fara saman um hetta virksemi, tí samstarvi førir við sær eina munadyggari nýtslu av alda laksinum hjá Faroe Farming og Viking Seafood.

## Avgerð

Kappingarráðið metir ikki, at stovnanin av SalmPro á nakran hátt fer at hindra virknari kapping á nøkrum føroyskum marknaði, við tað at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist.

Kappingarráðið avgerð tí at góðkenna stovnanina av SalmPro.



Skálatrøð 20 · P. O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Telefon: +298 35 60 40 · Telefax: +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

## Málslýsing

Tann 4. februar 2010 fekk Kappingareftirlitið fráboðan um samanlegging frá Faroe Seafood, Viking Seafood og Faroe Farming. Tann 10. februar 2010 boðar Kappingareftirlitið pørtunum frá, at fráboðan verður mett at vera fullfíggjað, sbrt. § 2, stk. 3 í reglugerð nr. 2 frá 10. januar 2008[1].

Partarnir upplýsa, at P/F Faroe Seafood samtakið hevði eina nettosølu á 711 mió. kr. í 2008, P/F Faroe Farming hevði eina nettosølu á 72 mió. kr. í 2008, og P/F Viking Seafood hevði eina nettosølu á 124 mió. kr. í 2008.

Grundað á samlaðu nettosøluna kemur samanleggingin undir ásetingina í § 14, stk. 2, nr. 3 í kappingarlógini. Hetta merkir, at Kappingarráðið skal viðgera samanleggingina eftir § 15 í kappingarlógini. Eftir § 15, stk. 1 í kappingarlógini kann Kappingarráðið ógilda eina samanlegging, um hon hindrar virknari kapping, við tað at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist.

Umboðini hava ynskt eina skjóta viðgerð av málinum og hava tí ikki ynskt at fáa tilmæli til hoyringar.

## Samanleggingin

Faroe Seafood, Viking Seafood og Faroe Farming hava gjørt eina avtalu um samstarv innan framleiðslu av liðugvørum úr laksi. Partarnir hava avtalað, at Viking Seafood, Faroe Farming og Faroe Seafood gerast líkastillaðir eigarar í Faroe Seafood Processing, ið Faroe Seafood eigur einsamalt í dag. Faroe Seafood Processing broytir í hesum sambandi navn til SalmPro.

Ætlanin er, at Faroe Farming og Viking Seafood umvegis sølufelagið Salmex skulu veita ráværu til SalmPro, meðan Faroe Seafood tekur sær av søluni av liðugvørunum hjá SalmPro.

Partarnir hava í fylgiskjali til partaeigarasáttmálan avtalað, undir hvørjum treytum Salmmex selur aldan laks til SalmPro. Sambært fylgiskjalinum kann SalmPro keypa frá øllum rávøru veitarum, og tá Salmex selur til SalmPro verður selt til vanligar marknaðartreytir. Gjaldstreytin er 21 dagar. Faroe Seafood og SalmPro skulu saman leggja framleiðslu og sølu soleiðis til rættis, at:

1. Prísurin fyri liðugvøruna er nøktandi
2. Framleiddar verða vørur, sum sølubílegging er til
3. Rávøra er tøk til sølubílleggingarnar

Faroe Seafood keypir liðugvøruna frá SalmPro og gjaldstreytin er kontant, t.v.s. innan eina viku.

Sambært avtaluni millum partarnir, skal Faroe Seafood á aðalfundinum hjá Faroe Seafood Processing, fremja eina kapitallækking á 5,5 mió. kr., so partapeningurin verður ½ mió. kr. Á sama aðalfundi verður kapitalhækking framd á 4,0 mió. kr. Síðan teknar Faroe Seafood seg fyri 1 mió. kr., meðan Viking Seafood og Faroe Farming hvør sær tekna fyri 1,5 mio. kr.

Á sama aðalfundi verður partaeigarasáttmálið undirskrivaður. Sambært hesum partaeigarasáttmála er SalmPro undir felagsleiðslu av nýggju eigarunum. Við støði í partaeigarasáttmálanum og avtaluni um samanlegging er Kappingareftirlitið komið til ta niðurstøðu, at talan er um stovnan av einum Joint Venture, ið á varandi grundarlagi hevur um hendi alt virksemið eins og hjá einari sjálvstøðugari fyritøku, sbrt. § 13, stk. 1, nr. 2 í kappingarlógini.

## Fyritøkurnar

Joint Venture fyritøkan er SalmPro, fyrrverandi Faroe Seafood Processing, ið var stovnað í 2003. Høvuðsvirksemið hjá Faroe Seafood Processing hevur verið framleiðsla av fiskavørum úr aldum laksi. Onki virksemi hevur verið í felagnum síðan fyrsta hálvár í 2008.

---

[1] Reglugerð nr. 2 frá 10. Januar 2008 um fráboðan av samanleggingum



Skálatrøð 20 · P. O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Telefon: +298 35 60 40 · Telefax: +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

Faroe Seafood Processing hevur frá bryjan havt tungan rakstur. Verður hugt at seinastu ársroknskapunum framgongur av leiðslufrágreiðingunum, at væntandi rávørunøgd hevur verið høvdusorsøkin til manglandi lønsemi hjá felagnum.

Mynd 1: Bruttovinningur og ársúrslit fyri 2004-2008 (í 1000 kr.)




Sum tað framgongur av mynd 1 hevur Faroe Seafood Processing í tíðarskeiðnum 2004-2008 havt hall øll árini.

Faroe Seafood samtakið fevnir um hesi feløg: Faroe France, Faroe Seafood UK, Faroe Fish I, Faroe Fish II, Kongshavn og FSSJ. Sambært ársroknskapinum frá 2008 eiga hesir meir enn 5%:

- Framtaksgrunnur Føroya
- Notio framtaksfelag P/F
- Vátryggingarfelag Íslands hf.
- Sp/f 29/3-2006

Høvuðsvirksemi hjá Faroe Seafood liggur innan fiskivinnu, og tí er marknaðarstøðan hjá Faroe Seafood óviðkomandi fyri eina meting av hesi samanlegging.

Virksemið hjá Viking Seafood fevnur um fiskaaling og slátur av sílum og laksi. Havsbrún Samtakið eigur 78% av partapeninginum í Viking Seafood. Viking Seafood hevur tvey aliloyvir av teimum 26 aliloyvunum, sum eru í Føroyum ídag.

Virksemið hjá P/f Faroe Farming fevnir um aling og slátur av laksi. Eigararnir í P/f Faroe Farming eru P/f Notio framtaksfelag(35%), Framtaksgrunnurin(32%), P/f Suðuroyaaling (17%) og P/f Havsbrún(16%). Faroe Farming hevur trý aliloyvi.

Viking Seafood og Faroe Farming hava í 2009 stovnað sølufelag saman, Salmex, ið stendur fyri allari sølu hjá feløgunum. Salmex selur uml. 8.000 tons av frystum laksi til útheimin. Um Kappingarráðið loyvir stovnanini av SalmPro, verður vantandi uml . 3.000 tons av laksi selt til SalmPro, sum síðan framleiðsur liðugvøru úr laksinum.

## Marknaðarlýsing

Ætlanin er, at framleiða liðugvøru úr laksi til ES og USA. Viðkomandi marknaðirnir eru sostatt marknaðurin fyri liðugvørur úr laksi í ES og USA.

Føroysku alifeløgini eru í heimshøpi millum smærri alifeløgini. Tá Kappingarráðið tann 28. oktober 2009 góðkendi samanlegginina millum P/f Vestlax Holding og P/f Bakkafrost Holding, var mett at hesin føroyski alirisin við samanlegginini gjørdist eitt miðalstórt alifelag í heimshøpi.

Fráboðari metir ikki, at tað er nakar marknaður, har í minsta lagi tvær av luttakandi fyritøkunum virka, har hesar sita á 15% ella meir av marknaðinum.



Skálatrøð 20 · P. O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Telefon: +298 35 60 40 · Telefax: +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

Fráboðari metir ikki, at tað er nakrastaðni í søluliðinum, at ein ella fleiri av luttakandi fyritøkunum sita á 25% av marknaðinum.

Kappingarliga ávirkanin av hesi avtalu, er sostatt lítil og ongin.

## Meting

Kappingareftirlitið metir, at samstarvi millum hesi trý feløg fær onga negativa ávirkan á føroyska samfelagið. Úrslitið av hesi avtalu er, at laksur sum vildi verði seldur ótilvirkaður, verður virðisøktur í Føroyum. Vøran verður seld á einum altjóða marknaði, og tí hevur hetta onga ávirkan á føroyska brúkaran.

Faroe Seafood Processing hevur síðan byrjan havt trupuleikar við rávøru grundarlagnum, og við hesi avtalu fær nýggja felagið tveir høvdusveitarar.

Henda avtala skapar onga størri miðsavning á nøkrum marknaði og tær veruligu forðingarnar sum eru í hesi vinnugrein koma av, at alingin er lógarregulera. Tí er ein avmarking á veitarasíðuni.

Kappingareftirlitið skal í síni viðgerð arbeiða við atlitið í §1 í kappingarlógini, sum sigur, at endamáli er at tryggja fulldygga samfelagsliga tilfeingisnýtslu. Hetta merkir, at tann leistur sum verður nýttur eigur altíð at skapa hægst møguligan ágoða fyri føroyska samfelagið.

Í hesum máli er talan um, at tríggir partar ynskja at reka eitt framleiðslufelag saman, við tí fyri eyga at virka liðugvøru úr laksi. Fyri føroyska samfelagið vil hetta føra til, at ein virðisøking sum higartil er farin fram uttan fyri Føroyar fer fram í Føroyum.

## Niðurstøðu

Kappingarráðið metir ikki, at stovnanin av SalmPro fer at hindra virknari kapping á nøkrum føroyskum marknaði, við tað at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist.

Kappingarráðið avgerð tí, at góðkenna stovnanina av SalmPro.

Vegna Kappingarráðið

Ingunn Ó. Eiriksdóttir
formaður

/Terje Sigurðson
deildarstjóri



Skálatrøð 20 · P. O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Telefon: +298 35 60 40 · Telefax: +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo